gult2 cyan2 magenta2 svart2

Fremmant farmaskip á Funningsfirði

Eitt ertendskt farmaskip lá og lossaði við bryggju í Funningsfirði hósmorgin
Mynd: Ivan K. Weng

Hósmorgunin lá eitt fremmant farmaskip og lossaði í Funningsfirði, hóast fjørðurin er stongdur fyri vanligari skipaferðslu. Men tað verð gjørt við loyvi frá landsdjóralekanum

SAMFERDSLA
Edvard Joensen

Hósmorgunin lá eitt fremmant farmaskip og lossaði á Funningsfirði. Tao undraði mong, at so var. Men Bjørn Harlou, landsdjórakekni, sigur, at loyvi er givið at lossa skipið, og allar reglur eru fylgdar.

Fólk sum ferðast oftast frá við Funningsfirði undrast á, at tað ber til at koma við einum farmaskipi til bryggju í Funningsfirði, lossa eina heila last og síðan sigla av aftur fuminum, tá heimafólkið ikki sleppur á flot at fáa sær at kóka.

Í umríddu fjørðinum var talan um eitt skip úr Baltalondum, sum komið var við plattatimbri til plattavirkið Atlantshav í Funningsfirði. Og ikki nokk við, at skipið er komið inn á ein stongdan fjørð. Tað varð eisini lossað, meðan verkfall annars er um stóran part av landinum.

John Kjeld, stjóri á Atlantshavi, sigur við Sosialin, at teir hava verið fyrivarnir og fingið loyvi frá avvarðandi myndugleikum at fáa skipið til bryggju.

– Vit hava øll okkara viðurskifti í lagi, sigur hann. Vit sóttreinsa øll akfør, vit brúka, seta bakkar við sitrónsyru fyri landgangin og gera annars alt tað, heilsumyndugleikarnir krevja.

Spurður hvussu tað ber til, at skipið verður lossað, hóast verkfall er, svarar hann, at tað gera hann sjálvur og arbeiðsformaðurin, sum ikki er í verkfalli. Og tí kann eingin foroa teimum í, sigur John Kjeld.

Vanligt hevur altíð verið, tá skip koma við plattatilfari, at mannagnin sjálv høggur í umborð, og formaðurin og onkur annar koyra frá á bryggjuni. Somuleiðis varð gjørt nú, og tað er avgjørt einki verkfallsrakt arbeiði, sum gjørt verður, leggur John Kjeld dent á.

Fólk, sum búgva við Funningsfjørð undrast á, at tað ber til at koma soleiðis og lossa og fara avstað aftur, tá øll fevnsla annars er bannlyst at kalla.

Til tað sigur Bjørn Harlou, landsdjórakekni, at hetta farmaskipið, talan er um, hevur fingið loyvi at koma inn á fjørðin og fara beinleiðis til havs aftur.

Treytað er tó, at einki verður fylt í ballastteingarnar, áðurenn komið er í rúmen sjógv, soleiðis at skipið ikki tekur møguliga smittu við sær aðrastaðni.

Landsdjórakekni sigur, at verða ter trygdareglur, sum hann hevur sett skipinum, fylgdar, er sera, sera lítil vandi fyri, at skipið ber smittu við sær aðrastaðni.

ILA virussið livir bert í kykmunum á fiski, og um tað skuldi hent, at okkurt var komið upp á skipssíðuna, meðan skipið hevur verið á Funningsfirði, verður tað heilt vist vaskað av aftur, meðan siglt verður millum lond, og so doyr tað beinanveg.

At onnur ikki sleppa at sigla á Funningsfirði kemst av, at tað stutt sagt ikki ber til at hava eftirlit við øllum bátum, sum ferðast aftur og fram. Og tá kann vera skjótt, at onkur, so ella so, smygur sær út um Múlan og endar aðrastaðni og á tann hátt kemur í samband við onnur alibrúk.

Fyri at fyribyggja tí, er einasti mátin stutt og greitt at steingja fjørðin fyri aðrari ferðslu enn henni, sum kemur beinleiðis úr havinum og fer beint aftur til havs, sigur landsdjórakekni.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða kona mín, góða mamma, vermamma, omma og systir okkara

Bodil Tausen
fødd Davidsen, Tórshavn

er heimkallað til Harran 16. mai 2001, 72 ára gomul.
Kistan kemur í Vesturkirkjuna leygardagin 19. mai kl. 17.00.
Jarðarferðin verður sunnudagin 20. mai kl. 14.30.

Vegna teyðarvarðandi
Klæmint,
Hans, Jensia og Halda við familjum

Tey, sum vilja minnast Bodil, kunnu gera Meinigheitshúsinum í Havn eina gávu

Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum mintust okkum og syndu samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

Alma Sikivat Andersen

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávur, minningarorð og heilsanir annars.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk til prest fyri tróystarrík orð, takk fyri vakran sang og hornblástur í kirkjuni.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Birthe, Fróði, Benthe og Hans Ole

Sosialurin
Sosialurin
i

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Postverkið verður endurnýggjað

Postverkið eigur at verða lagt um og endurnýggjað. Tann semjan stendur við, og peningur verður settur av til umleggingina. Hetta staðfestir Tjóðveldisflokkurin, sum átalar ákærurnar frá Bjarna Djurholm, um at Tjóðveldisflokkurin hevur forða fyri, at Posverkið verður dagført

POSTVERKIÐ
John Johannessen

Ákæran um, at Tjóðveldisflokkurin skal hava borið so í bandi, at Posverkið ikki verður dagført, eins og landsstýrismaðurin í vinnumálum hevði ætlað, eru púra ógrundaðar.

Hetta staðfestir Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

– Tjóðveldisflokkurin hevur í øllum lutum stuðlað, at Postverkið kann umskipa seg til ein sjálvstøðugan stovn, endurnýggja seg, rationalisera og betra inntøkugrundarlagið.

– Einasta kravið frá Tjóðveldisflokkinum hevur verið, at tá stóran umleggingar verða gjørdar, skal hetta vera í samráð við starvsfólkið og avvarandi fakfeløg. Harafturat skal umleggingin gerast á ein skipaðan hátt, so ótryggleiki og kaos ikki valdar, sigur Høgni Hoydal.

Semjan stendur við

Í grein í Sosialinum í gjár varð vístá, at ein politisk semja varð gjørd í landsstýrinum, um at postverkið skuldi umskipast. Hesa semjuna segði Bjarni Djurholm, at Tjóðveldisflokkurin hevur brotið.

Men sambært Høgna Hoydal stendur semjan við.

– Royndirnar av framferðini viðvíkjandi Landsverksfrøðingsstovninum siga alt um, hvussu farast kann skeivt fram við tí úrsliti, at ótryggleiki valdar og stórur førleiki kann fara fyri skjeyti.

– Tí varð ein politisk semja gjørd um, at komandi trý árini skal Postverkið fara undir eina umlegging, og at neyðugur peningur verður settur av til íløgur í tøkni, eftirútbúgving og skipanir fyri starvsfólkið.

– Hendan semja stendur við, og umleggingin kann fremjast beinan vegin, staðfestir Høgni Hoydal.

Roynir at privatisera

Lógaruppskotið hjá Bjarna Djurholm um postvirksemi varð ikki avgreitt í tinginum hesa setuna. Men tað heldur Høgni Hoydal ikki vera nakra gølu, tí uppskotið hevði einki beinleiðis við ætlaðu umleggingarnar á posthúsinum at gera. Talan var um eina generella lóg um postvirksemi. Uppskotið gav ikki Postverkinum pening ella nakra nýskipan.

– At bæði postverksstjórin og landsstýrismaðurin í vinnumálum alment hava hótt við hópuppsagnum á Postverkinum, eftir at uppskotið ikki kom fram aftur úr vinnunevndini, hevur onga sakliga grundgeving. Tað svarar til, at landsstýrismaðurin í mentamálum hevði hótt við hópuppsagnum á Útvarpi og Sjónvarpi, eftir at uppskotið um kringvarp mátti takast aftur, vísir Høgni Hoydal á.

Formaður Tjóðveldisfloksins vísir á, at lógin um postvirksemi kann leggjast fram aftur á ólavsøku, tá ivaspurningar í vinnunevndini vónandi verða greiðir.

– At ótryggleiki og politisk rumbul nú verður skapt av hesum, kann bara grundgevast við partapolitiskum áhugamálum.

– Tað tykist sum endamálið er at mála eina so svarta mynd av Postverkinum, at onki skal bera til uttan at lata privatar taka uppgávurnar uppá seg.

– Men ongin politisk forðing er fyri at fara undir umleggja Postverkið til eina nútímans fyritøku. Verður tað gjørt við virðing fyri starvsfólki og teirri týdningarmiklu uppgávu, sum postflutningur er í einum landi, so skuldi borið væl til, sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins.

Formaður Tjóðveldisfloksins vísir aftur øllum ákærum um, at Tjóðveldisflokkurin skal hava forað fyri, at Postverkið ikki verður endurnýggjað



T r urum
t v l r tt
-t v l luvt F r y nk